# Greiningafrymil til film

Hesin greiningarfrymil er rúgvusmikil. Tað ber til at velja burturúr at viðgera nærri.

Greina eftir frymlinum

1. Greið í stuttum frá innihaldinum

2. Hvørji evni viðger filmurin

3. Greið frá persónunum
   - Hvussu og á hvønn hátt verða vit kend við høvuðspersónin/-persónarnar?
   - Hvat fáa vit at vita um høvuðspersónin/-persónarnar
     1. Í fyrstani
     2. So við og við
     3. Móti endanum
   - Hvat sigur/siga høvuðspersónurin/-persónarnir um seg sjálvan?
   - Hvussu sær/síggja viðkomandi út?
   - Hvør menning fer fram, sum filmurin líður?
   - Virkar høvuðspersónurin/-persónarnir trúligur/trúligir?

4. Tíð og umhvørvi
   - Nær er filmurin gjørdur?
   - Nær fer hann fram?
   - Tykist staðið trúligt í mun til ta tíðina?
   - Hvussu langa tíð fevnir filmurin um?
   - Hvussu er umhvørvið?
   - Hvar fer søgugongdin fram? (land, býur o.s.fr.)

5. Slag av filmi
   - Spenningsfilmur, skemtifilmur, kærleiksfilmur, familjufilmur, ræðufilmur, drama, dokumentarfilmur o.s.fr.

6. Hvat verður nýtt at fáa rætta huglagið fram
   - Kameravinklar
   - Sjónarhorn
   - Kamerarørslur
   - Klipp
   - Ljós
   - Filtur
   - Tónleikur

7. Hvønn boðskap ber filmurin?

8. Hvat heldur tú um filmin?